LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 29. september 2016
J.Nr.: LUM-80- 16/00043-9
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

Álit

viðvíkjandi klagu um vantandi innlit í upplýsingar um heilivágsnýtslu í alibrúkum

Við teldubrævi 5. apríl 2016 hevur A sent umboðsmanninum eina klagu um avgerðina hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum, dagfest 29. mars 2016, at staðfesta eina avgerð hjá Apoteksverkinum um at sýta innlit í upplýsingar um, hvørji evni og hvussu stórar mongdir alivinnan brúkar til avlúsing av fiski í alibrúkum á sjónum.

Málsgongd

Kæruavgerðin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum, sum er endurgivin undir partshoyringini, lýsir málsviðgerðina á nøktandi hátt, og eg havi tí valt ikki at gera eina nærri lýsing av málsgongdini.

Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 21. apríl 2016, varð klagan send Heilsu- og innlendismálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Heilsu- og innlendismálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 10. mai 2016 sendi Heilsu- og innlendismálaráðið umboðsmanninum skjølini í málinum og vísti til kæruavgerðina viðv. grundgevingunum fyri, hví innlit varð noktað í málinum.

Kæruavgerðin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum, dagfest 29. mars 2016, er soljóðandi:

> "**Viðv. kæru um noktandi innlit frá Apoteksverkinum**
> Heilsu- og innlendismálaráðið móttók tann 10. november 2015 kæru frá tygum um noktandi innlit frá Apoteksverkinum. Tann 11. desember 2015 heimvísti Heilsu- og innlendismálaráðið málinum til nýggja viðgerð hjá Apoteksverkinum. Tann 15. januar 2016 tók Landsapotekarin avgerð um at fasthalda avgerðina um at nokta tygum innlit. Tann 4. februar 2016 sendi Heilsu- og

innlendismálaráðið teldupost til tygara, har spurt varð um kæra tygara stendur við. Í telduposti sama dag svara tygum, at kæran stendur við. Tann 12. februar 2016 boðar Heilsu- og innlendismálaráðið tygum frá, at málið verður tikið upp til realitetsviðgerð.

Tygum kæra, at tygum ikki hava fingið innlit í:

- Hvørji evni og hvussu stórar mongdir alivinnan sleppir at brúka til avlúsing av fiski sum gongur í alibrúkum á sjónum kring um landið
- Hvat tað er fyri evni, og hvussu ávirka tey náttúru, fisk og fólk, sum koma beinleiðis í kontakt við hesi evni.

1. Fyrisitingarlig saksviðgerð

Apoteksverkið upplýsir í avgerð sínari, dagfest 15. januar 2016, at verkið ikki hevur framleitt nøkur skjøl í sambandi við útflýggjan av heilivági, sum eru partur av fyrisitingarligari viðgerð. Apoteksverkið metir ikki, at har fyriliggja nøkur skjøl, ið eru fevnd av § 4, stk. 1 í innlitslógini.

Sambært § 4, stk. 1 í innlitslógini kann ein og hvør, við ávísum undantøkum, krevja at fáa innlit í skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í sambandi við virksemi myndugleikans. Rætturin til innlit fevnir sostatt um skjøl, sum eru til taks í málinum. Ein myndugleiki hevur ikki skyldu til at framleiða nýggj skjøl í sambandi við viðgerðina av einari innlitsumbøn. Tað vil siga, at Apoteksverkið í hesum førinum bert hevur skyldu til at lata innlit í tey skjøl, sum Apoteksverkið hevur til taks.

Heilsu- og innlendismálaráðið spurdi Apoteksverkið tann 23. februar 2016, hvussu mannagongdin er í sambandi við sølu av heilivági. Landsapotekarin upplýsti í hesum sambandi, at djóralækni sendir forskrift til Apoteksverkið. Tá ið heilivágur verður latin, verður rokning skrivað til alibrúkið. Forskriftirnar frá djóralæknunum verða nýttar sum grundarlag, tá ið Apoteksverkið tekur avgerð um, hvørt eitt alibrúk skal fáa heilivág. Tá ið heilivágur verður latin, verður rokning skrivað til alibrúkið.

Heilsu- og innlendismálaráðið bað Landsapotekaran um at senda okkum nøkur dømi uppá omanfyrinevndu forskriftir og rokningar. Tann 24. februar 2016 sendi Landsapotekarin avrit av nøkrum forskriftum frá fiskadjóralæknum og rokningum til alifyritøkur.

Hetta eru alt skjøl, ið Apoteksverkið hevur til taks í sambandi við fyrisitingarliga saksviðgerð. Skjølini eru fevnd av § 4, stk. 1 í innlitslógini, og støða má tí takast til, um skjølini kunnu undantakast innliti sambært undantaksreglunum í innlitslógini.

2. Vinnuligt virksemi.

Apoteksverkið hevur noktað innlit vísandi til § 12, stk. 1, nr. 2 í innlitslógini, sum sigur, at innlit kann noktast, um talan er um upplýsingar um tøkniligar útbúningar ella mannagongdir, ella um rakstrar- ella vinnuviðurskifti ella líknandi, um so er, at tað hevur stóran fíggjarligan týdning fyri virkið, sum upplýsingin viðvíkur, at innlitsumbønin ikki verður gingin á møti.

Tann 3. mars 2016 sendi Heilsu- og innlendismálaráðið teldupost til Landsapotekaran. Í teldupostinum vísir ráðið á, at treytin fyri at kunna nokta innliti sambært § 12, stk. 1 í innlitslógini er, at tað eftir einari ítøkiligari meting verður mett at viðføra fyritøkunum skaða, serliga skaða av fíggjarligum slagi, um innlit verður latið. Heilsu- og innlendismálaráðið bað tí Landsapotekaran greiða frá, í hvønn mun tað gongur út yvir fyritøkurnar, um innlit verður latið, herundir í hvønn mun fyritøkurnar kunnu fáa ein fíggjarligan miss, um innlit verður latið. Upplýst varð, at sambært vegleiðingini til innlitslógina kann Apoteksverkið, um ivi er, senda spurningin víðari til alifyritøkurnar, og spyrja fyritøkurnar um og í hvønn mun tær kunnu væntast at fáa ein fíggjarligan

miss, um innlit verður latið. Boðað varð frá, at Heilsu- og innlendismálaráðið, tá ið ráðið móttók svarskriv frá Apoteksverkinum, fór at meta um, hvørt grundgevingarnar kundu bera undantak sambært § 12, stk. 1 í innlitslógini.

Tann 7. mars 2016 sendi Landsapotekarin fyrispurningin víðari til alifyritøkurnar. Tann 23. mars 2016 sendi Landsapotekarin svarini frá alifyritøkunum til Heilsu- og innlendismálaráðið.

B svarar soleiðis: "Okkara framleiðsla er undir strongum eftirliti, bæði av okkara egnu starvsfólkum og ikki minst av almennum stovnum, vit eru í harðari kapping við onnur lond um at framleiða besta laksin, og meta vit, at um innlit verður givið, so kunnu hesi tøl blíva brúkt og ikki minst misbrúkt í almennu pressuni ímóti okkara fyritøku. Tað er galdandi fyri allar framleiðslufyritøkur, at rakstrarætlanin - eisini okkara ætlan fyri, hvussu vit takla trupulleikan við lús, hvønn heilivág og hvørjar nøgdir vit brúka - er at meta sum sera viðkvæmir upplýsingar, og sum ein fyritøka eigur at sleppa at hava fyri seg sjálvan."

D svarar soleiðis: "Allar alifyritøkur eru undir strongum almennum eftirliti, og øll framleiðsla er góðkend. Somuleiðis er øll viðgerð góðkend. Tað eru bert 4 alifyritøkur í Føroyum og eru einastu kundar hjá Apotekinum á júst hesum øki. Alifyritøkurnar kappast innanhýsis og uttanlands, og júst, hvussu alifyritøkurnar fyribyrgja lús, er ein kappingarstøða millum feløgini. Tað er ein vinnuligur loynidómur, hvussu nógv evnir D nýtir, umframt hvørjar aðrar hættir fyritøkan brúkar í sambandi við avlúsing. D er kundi hjá Apotekinum og keypir heilivág í sambandi við avlúsing, sum part av teirra tøkniliga útbúnaði og rakstri til avlúsing, og ikki bert heilivág. Reint fíggjarliga hevur tað avleiðingar fyri D, um eitt víðkað innlit verður givið. Tað er ein nærliggjandi váði, at upplýsingarnar fara at skaða D bæði kappingarliga og fíggjarliga, um eitt víðkað innlit verður givið. Tapið í hesum føri er, at upplýsingar fara at skaða D soleiðis, at marknaðarpartar vera mistir, tí at keyparar fáa beinleiðis innlit í, hvat er brúkt av heilivági á júst einum øki - loynidómar, sum vera frambornir av 3. persóni og tí kunnu geva eina ranga støðulýsing. Kappingarførið verður verri, tí kappingarneytar fáa innlit í, hvussu nógv evnir D hevur brúkt, og kann hetta brúkast í kappingini á marknaðinum."

E svarar soleiðis: "... Tað er ein handilsligur loynidómur, hvussu nógvan heilivág ein alifyritøka brúkar, og tað er eisini okkara fatan, at hesar upplýsingar eisini kunnu misbrúkast. Orsøkin er, at tað ikki gevur røttu myndina av støðuni bert at vísa á, hvussu nógvan heilivág ein alifyritøka hevur brúkt á einum firði í einum ávísum tíðarskeiði. Tá hevur tað eisini týdning, at aðrar viðkomandi upplýsingar eisini koma fram, og hetta letur seg sjálvandi ikki gera. Tað er eisini okkara fatan, at innlit eigur at verða noktað við tilvísing til § 13, stk. 1, litra 6, tí tað kann skaða eina alifyritøku almikið, um fjølmiðlar - uttan at taka samlaðu myndina við í viðgerðina - fara at upplýsa eksaktar mongdir av heilivági, sum verða brúktar á teimum einstøku aliøkjunum. Hetta kann í avgjørdan mun verða til skaða fyri marknaðarstøðuna hjá eini alifyritøku. ... Talan er um upplýsingar um, hvussu nógvan heilivág hvør fyritøka brúkar, og slíkar upplýsingar eiga ikki at vera almennir, tí talan er um sera viðkvæmar upplýsingar. Talan er eisini um rakstrar- og vinnuligar upplýsingar, og tað kann hava sera stóran fíggjarligan týdning fyri E, at hesar upplýsingar ikki verða almannakunngjørdar. § 12 í innlitslógini sigur, at upplýsingar, sum hava stóran tøkniligan og fíggjarligan týdning fyri eina fyritøku, ikki eru fevndar av reglunum um alment innlit. Alifyritøkurnar eru undir almennum eftirliti, og framleiðslan er góðkend. Tað eru matvørur, sum verða framleiddar, og framleiðslan er undir strongum eftirliti."

F svarar soleiðis: "... Her eru vit av tí fatan, at tað fyri einstøku alifyritøkurnar hevur stóran týdning, at innlit ikki verður givið í spesifikatión av tølum fyri evni og mongdir, sum verða brúkt til avlúsing av alifiski uppá firðir ella aliøki. Hetta eru upplýsingar, sum hava stóran týdning fyri kappingarførið, marknaðarstøðuna og fíggjarligu støðuna hjá einstøku alifyritøkunum í kappingini teirra millum og mótvegis alifeløgum í øðrum londum. Talan er um upplýsingar, sum lættliga kunnu fáa eina neiliga

ávirkan á einstøku alifyritøkurnar, um upplýsingarnar verða almannakunngjørdar ella latnar øðrum, uttan at tað samstundis loyalt verður greitt frá øðrum viðkomandi viðurskiftum. Fyri einstøku alifyritøkurnar er talan um vinnuloynidómar, og tað kann fáa stóran týdning kappingarliga og fíggjarliga, um innlit verður givið í, hvat eitt alifelag hevur brúkt til avlúsing á hvørjum einstakum alibrúki/fjørði. Samanumtikið eru vit tí av tí fatan, at í tann mun, at hetta yvirhøvur er fevnt av innlitslógini, so eigur ein spesifikatión av tølum fyri evni og mongdir, sum verða brúkt til avlúsing av alifiski uppá firðir ella aliøki, at verða undantikin almennum innliti. Í hesum sambandi verður vístvíst til § 12, stk. 1, nr. 2 og § 13, stk. 1, litra 6) í innlitslógini. At enda skal verða vístvíst á, at virksemið hjá alifyritøkunum er undir strongum almennum eftirliti, sum m.a. skal tryggja, at alifyritøkurnar nýta evni til avlúsing á lógligan og forsvarligan hátt."

Sambært § 12, stk. 1, nr. 2 fevnir skjalainnlit ikki um upplýsingar um tøkniligar útbúningar ella mannagongdir, ella um rakstrar- ella vinnuviðurskifti ella líknandi, um so er, at tað hevur stóran fíggjarligan týdning fyri tann persónin ella virkið, sum upplýsingin viðvíkir, at áheitanin ikki verður gingin á møti. Treytin fyri at kunna nokta innliti sambært § 12, stk. 1 í innlitslógini er, at tað eftir einari ítøkiligari meting verður mett at viðføra fyritøkunum skaða, serliga skaða av fíggjarligum slagi, um innlit verður latið.

Í hesum førinum vísa alifyritøkurnar á, at tær eru í harðari kapping við onnur lond um at framleiða besta laksin. Upplýsingar um, hvussu alifyritøkurnar takla trupulleikan við lús, hvønn heilivág, hvørjar hættir og nøgdir tær nýta til avlúsing á hvørjum einstøkum firði, eru vinnuloynidómar, ið kunnu skaða kappingarførið, marknaðarstøðuna og fíggjarligu støðuna hjá alifyritøkunum bæði innanlands og uttanlands. Tað er ein nærliggjandi vandi fyri fíggjarligum- og kappingarligum avleiðingum, um innlit verður latið. Tapið í hesum førinum kann verða, at marknaðarpartar vera mistir.

Heilsu- og innlendismálaráðið metir ikki, at ráðið kann seta til viks metingarnar frá vinnuni um, at tað er ítøkiligur vandi fyri, at tað kann skaða bæði kappingarførið og fíggjarligu støðuna hjá alifyritøkunum, um innlit verður latið. Heilsu- og innlendismálaráðið hevur tí ikki viðmerkingar til, at Apoteksverkið hevur noktað innlit í hesum máli vísandi til § 12, stk. 1, nr. 2.

Sambært § 12, stk. 2 í innlitslógini er tað soleiðis, at um bert ein partur av skjalinum/skjølunum kemur undir ásetingina í § 12, stk. 1, skal innlit latast í hin partin av innihaldinum í skjalinum/skjølunum. Hetta er sokallaða ekstraheringsskyldan. Sambært hesum hevur myndugleikin skyldu til at lata innlit í teir partar av skjalinum, sum ikki fevna um § 12, stk. 1 upplýsingar.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur fingið dømi um tey skjøl, ið fyriliggja í hesum máli. Hetta eru forskriftir frá djóralæknum og rokningar til alifyritøkurnar. Heilsu- og innlendismálaráðið metir, at allir teir upplýsingar, ið eru á hesum skjølum, eru tengdir at omanfyrinevndu undantøku fyri innliti sambært § 12, stk. 1, nr. 2. Mett verður ikki, at tað ber til at ekstrahera partar av upplýsingum úr teimum skjølum, ið Apoteksverkið hevur til taks í hesum máli.

3. Niðurstøða

Heilsu- og innlendismálaráðið metir ikki, at ráðið kann seta til viks metingarnar frá vinnuni um, at tað er ítøkiligur vandi fyri, at tað kann skaða bæði kappingarførið og fíggjarligu støðuna hjá alifyritøkunum, um innlit verður latið, jb. § 12, stk. 1, nr. 2 í innlitslógini. Harumframt metir Heilsu- og innlendismálaráðið ikki, at tað ber til at ekstrahera partar av upplýsingum úr skjølunum í málinum vísandi til § 12, stk. 2. Heilsu- og innlendismálaráðið hevur tí ikki viðmerkingar til, at Apoteksverkið hevur noktað innlit í hesum málinum."

Tann 29. juni 2016 boðaði umboðsmaðurin klagaranum frá, at klagan fór at verða viðgjørd eftir summarferiuna. Tann 14. september 2016 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at farið varð undir viðgerðina av klaguni.

Niðurstøða

Hendan klagan snýr seg um, at Heilsu- og innlendismálaráðið hevur staðfest avgerðina hjá Apoteksverkinum um at sýta klagaranum innlit í upplýsingar um heilivágsviðgerð fyri laksalús vísandi til § 12, stk. 1, nr. 2 í innlitslógini.

§ 12, stk. 1, nr. 2 og stk. 2 í innlitslógini eru soljóðandi:

> "*Undantøka av upplýsingum*
>
> **§ 12.** Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um upplýsingar um
> 1) ...
> 2) tøkniligar útbúningar ella mannagongdir, ella um rakstrar- ella vinnuviðurskifti ella líknandi um so er, at tað hevur stóran fíggjarligan týdning fyri tann persónin ella virkið, sum upplýsingin viðvíkir, at áheitanin ikki verður gingin á møti.
> *Stk. 2.* Um bert ein partur av skjalinum kemur undir ásetingina í stk. 1, skal hann verða kunnaður við hin partin av innihaldinum í skjalinum."

Treytin fyri at undantaka upplýsingar um rakstrar- og vinnuviðurskifti, sum umbidnu upplýsingarnar í málinum mugu metast at vera, er, at tað ítøkiliga verður mett at vera stórur vandi fyri fíggjarligum missi fyri tað ella tey virki, sum upplýsingarnar viðvíkja, orsakað av, at innlit verður latið í upplýsingarnar. Greitt samband skal vera ímillum, at innlit er givið í upplýsingarnar og vandan fyri, at fyritøkurnar missa pening. Stendst fíggjarligi missurin av øðrum orsøkum, kann innlit ikki sýtast við heimild í § 12, stk. 1, nr. 2.

Sambært ásetingini er tað myndugleikin, t.v.s. í ítøkiliga førinum í fyrsta umfari Apoteksverkið, sum sjálvt skal meta um, hvussu ein møguligur fíggjarligur missur fer ella kann fara at vísa seg sum avleiðing av, at innlit verður latið í umbidnu upplýsingarnar. Ivast myndugleikin í hesum, eigur myndugleikin at spyrja tær fyritøkur, sum upplýsingarnar viðvíkja. Eitt slíkt ummæli er ikki bindandi fyri myndugleikan, ið skal taka avgerð við støði í sjálvstøðugari meting.

Í ítøkliga málinum hevur Apoteksverkið ikki gjørt hesa meting, men bert sent ummælini frá alifyritøkunum víðari til Heilsu- og innlendismálaráðið. Í grundgevingini fyri at staðfesta avgerðina hjá Apoteksverkinum um at sýta klagaranum innlit sigur Heilsu- og innlendismálaráðið seg ikki kunna seta til viks metingarnar frá alifyritøkunum um, at tað er ítøkiligur vandi fyri, at tað kann skaða bæði kappingarførið og fíggjarligu støðuna hjá fyritøkunum, um innlit verður latið í umbidnu upplýsingarnar.

Sum grundarlag fyri ikki at kunna seta metingarnar hjá alifyritøkunum til viks skrivar Heilsu- og innlendismálaráðið soleiðis í avgerðini:

> "Í hesum førinum vísa alifyritøkurnar á, at tær eru í harðari kapping við onnur lond um at framleiða besta laksin. Upplýsingar um, hvussu alifyritøkurnar takla trupulleikan við lús, hvønn heilivág, hvørjar hættir og nøgdir tær nýta til avlúsing á hvørjum einstøkum firði, eru vinnuloynidómar, ið kunnu skaða kappingarførið, marknaðarstøðuna og fíggjarligu støðuna hjá alifyritøkunum bæði innanlands og uttanlands. Tað er ein nærliggjandi vandi fyri fíggjarligum- og kappingarligum avleiðingum, um innlit verður latið. Tapið í hesum førinum kann verða, at marknaðarpartar vera mistir."

Alifyritøkurnar bera í sínum ummælum í høvuðsheitum framm somu sjónarmið, uttan at tað í skjølunum frá Heilsu- og innlendismálaráðnum sæst, hvør støðan hjá einstøku fyritøkuni er, tá um viðgerð fyri laksalús ræður, ella um viðurskiftini hjá fyritøkunum í aðramáta eru eins.

Ein fyritøka, sum er í kapping við aðrar fyritøkur, er støðugt í vanda fyri at missa partar av marknaðinum ella pening. Við hesum í huga hoyrir tað helst til undantøkini, at avgerandi orsøkin til, at ein fyritøka av kappingarávum er fyri fíggjarligum tapi, er, at innlit er latið í upplýsingar um rakstrarviðurskifti.

Ummælini eru eftir mínum tykki meira at meta sum ein felags yvirskipað støðutakan til spurningin um at geva innlit í upplýsingar um viðgerð fyri laksalús. Eg haldi ikki, at Heilsu- og innlendismálaráðið hevur gjørt neyðugu sjálvstøðugu metingina sambært § 12 um ítøkiliga vandan fyri fíggjarligum missi hjá einstøku fyritøkuni við bert at endurgeva sjónarmiðini hjá fyritøkunum og vísa til, at ráðið ikki kann seta til viks sjónarmiðini hjá alifyritøkunum.

Sum eitt dømi um vantandi sjálvstøðugu metingina kann m.a. verða vístá, at Heilsu- og innlendismálaráðið ikki sæst hava tikið við í viðgerðina av avleiðingunum fyri kappingarførið í mun til útlendskar fyritøkur, at í t.d. Noregi eru upplýsingar um staðseting av aliringum, hvør loyvishavarin er, og hvørji sløg og nøgdir av heilivági verðar nýttar, almennar á heimasíðuni hjá norska Matvørueftirlitinum.

Vísandi til viðmerkingar mínar fari eg at biðja Heilsu- og innlendismálaráðið um at taka málið uppaftur til viðgerðar og lata meg frætta aftur um úrslitið av viðgerðini.

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður